

Vit heinta tann blåa posan, tá fólk ringja til okkara sigur Mikkjal Absalonsen

Brent meira enn roknað við

Tað er nú hálvtannað ár síðani brennistøðin á Sandvíkahjalla byrjaði at taka ímóti ruski. Í fjør brendu teir 11.000 tons av burturkasti, og er hetta nógv meira enn teir høvdu roknað við. Mett varð at teir komu at brenna eini 6000 til 8000 tons um árið. Ovnarnir koyrdu 60—70% av tíðini.

Rusk fýkur av bilum

Sum heild er Mikkjal Absalonsen væl nøgdur við gongdina og arbeiði á brennistøðini higartil. Teir hava onga arbeiðsvanlukku havt, tíbetur. Men hann kundi hugsað sær, at fólk, sum koyra rusk til støðina við bili, leggja okkurt útyvir ruskið, soleiðis at tað ikki fýkur omanav. Brennistøðin hevur fingið nógvar klagur um hetta.

Annars heldur hann, at eitt nú virkir eru ov skjøtisleys, tá tey koyra rusk í bingjurnar, tí tey taka ikki so sum PVC-rør frá.

Hetta er jú vandamikið at brenna. Eisini heldur hann, at fólk kunnu lata vera við at koyra gamla saltgrind í ovnarnar, tí hetta vilja teir sleppa undan at brenna. Hvørja ferð grind er kemur nakað av gamlari saltgrind til brennistøðina.

Umframt at brenna ruskið hjá íbúgvunum í Suðurstreymi og í Argja kommunu, so verður eisini rusk úr einum parti av Suðuroynni brent á støðini.

Hetta verður koyrt í bingjur og flutt við Smyrli til Havnar.

Nú um dagarnar kom annars ein sandbátur úr Suðuroynni til Havnar fullur av burturkasti frá ódnini herfyri. Ruskið varð brent og tyrvt. Hetta er tó ikki tann vanligi flutningshátturin.

Jan

20 børn á barnalegu

Freistin at tekna seg fyri at sleppa við á altjóða barnalegu í ár er longd til 25. januar, sigur CISV, sum á hvørjum ári sendir børn á altjóða barnalegur í ymsum londum.

Børnini, sum sleppa við, skulu verða fylt 11 ár í summar. Teimum stendur í boði at fara á fimm ymsar barnalegur, í Romsdal í Noregi frá 11. juli, í Gøteborg í Svøriki frá 5. juli, í Damstad í Vesturtýsklandi frá 21. juli, í Ottawa í Kanada frá 5. juli og í Sao Paulo í Brasilia frá 5. juli. Allar legurnar eru í fýra vikur, og tvær gentur og tveir dreingir úr Føroyum sleppa við á hvørja legu saman við einum leiðara.

Børn, sum vilja á barnalegu, skulu senda CISV í Føroyum eitt bræv og siga eitt sindur um seg sjálv.

Tørvar leiðarar

Sum nevnt fara leiðarar við børnunum á barnalegurnar. Leiðararnir skulu verða fyltir 21 ár, og CISV heitir á ungfólk um at tekna seg sum leiðarar. Tað er ikki minni upplíving at fara við sum leiðari, og CISV rindar fyri ferðina hjá leiðarunum. Børnini gjalda sjálv ferðina.

Leiðararnir leggja ferðina til rættis saman við foreldrum og fyrireika børnini til ferðina. Umframt leiðarar eru eisini ungleiðarar á øllum barnalegum. Ungleiðararnir eru um børnini á leguni og læra harvið at skipa barnalegur.

Í ár eru triggir ungleiðarar bodnir úr Føroyum á legu. Ungleiðararnir ksulu vera 16-17 ár. Tey kunnu sleppa við á legu í Bacolod á Filipinunum frá 29. desember, í Habo í Svøriki frá 4. juli og í Bursa í Turkalandi frá 3. juli.

Statens kunstfond

I foråret 1989 uddeles efter ansøgning en række arbejdslegater og 3-årige stipendier til bildende kunstnere, forfattere, komponister, kunsthåndværkere, kunstneriske formgivere og arkitekter. (Der ydes ikke legatmidler til kunstnere under uddannelse).

En ansøgning må indeholde en nærmere redegørelse for den eller de arbejdsopgaver, hvortil legatet søges. Dramatikere bedes vedlægge manuskripter til skuespil eller radiospil, for så vidt de ikke allerede foreligger i bogform. Komponister bedes vedlægge 3 kompositioner i partitur eller på bånd, bildende kunstnere, kunsthåndværkere, kunstneriske formgivere og arkitekter kan medsende arbejdstegninger eller fotos. Indsendt bilagsmateriale må ikke overstige, hvad der kan rummes i en A4-kuvert. Fondet kan ikke påtage sig ansvar for indsendt materiale.

Der anvendes ikke særligt ansøgningsskema. Ansøgning tydeligt forsynet med ansøgerens navn, adresse og postnummer må være fondet i hænde senest onsdag den 15. februar 1989. Ansøgninger indleveret efter ansøgningsfristens udløb vil der først blive taget stilling til ved en senere lejlighed.

Fondets adresse: Sankt Annæ Plads 10b, 1250 København K.

Postverk Føroya

Skrivstovustørv á Posthúsinum í Tórshavn

Á posthúsinum í Tórshavn eru skrivstovustørv leys at søkja. Talan er um fast starv og avloysing fyri starvsfólk, ið halda frí vegna barnsburð o.a.

Arbeiðstíðin er 40 tímar um vikuna í skiftandi vaktum, sum fyri tað mesta liggja ímillum klokkan 8 og 19.

Byrjunarlønin er sambært sáttmála ímillum Føroya Landsstýri og Føroya Postfelag umleið 12.000 kr. um mánaðan — fyri fólk yvir 30 ár umleið 13.000 kr. Útbúgving ella handils/skrivstovuarbeiði frammanundan er ein fyrimunur, men ikki ein treyt, tá upplæring til starvið verður á staðnum. Skrivlig umsókn við upplýsing um aldur og møguliga útbúgving verður at senda til:

Posthúsið í Tórshavn
Posthúsbrekka 4
100 Tórshavn

merkt »umsókn« í seinasta lagi tann 24. Januar 1989.

Klagur um telefonbrek frá fyritøkum í Eysturoynni

Telefonbólkurin í Eysturoynni hevur avtalu við 8 fyritøkur í oynni um at boða bólkinum frá, hvørja ferð klagur verða sendar Telefonverkinum. Hetta byrjaði hálvan juli 1988.

Eitt samanlagt yvirlit sigur frá:

hálvur juli:	33 klagur um	173 miseydnaðar royndir
august	77 klagur um	560 miseydnaðar royndir
september	87 klagur um	522 miseydnaðar royndir
oktober	104 klagur um	1033 miseydnaðar royndir
november	45 klagur um	358 miseydnaðar royndir

Minkingin í klagutalinum í november stavar frá nógv færri klagum úr Runavík í november. Klagutalið aðrastaðni tykist standa óbroytt við.

Tær klagur frá september til oktober, sum eru útgreinaðar, kunnu bytast soleiðis upp:

Tøgn aftaná at snarað er	27%
upptikin-tóni, tá hornið verður tikið av	23%
eingin klártóni, tá hornið verður tikið av	15%
samrøðan slitin	15%
óviðkomandi komin inn á samrøðun	3%
vánalig góðska	5%
onnur brek	12%

Bólkurin hevur ikki enn fingið svar uppá skriv til Telefonverkið av 8. august 1988 um at fáa í lag ein fund millum bólkin og Telefonverkið.

Bólkurin væntar tó, at Telefonverkið skjótt fer at svara bólkinum.